# GERÐABÓK

**Dato:** **27. januar 2011** **kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:01/11-26/11**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Jógvan Arge
Rúni Djurhuus
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Elin Lindenskov
Annfinn Brekkstein
Vagnur Johannesen
Levi Mørk
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Marin Katrina Frýdal, ið var uttanlanda
Maria H. Olsen, í farloyvi

**LUTTÓKU EISINI:**
Jákup E. Hansen
Jóan Petur Hentze

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**03/11** **2011-0172**

**Maria Hammer Olsen hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Rúni Djurhuus, eru loknar.

**Býráðið 27. januar 2011:** Samtykt.

**04/11** **2011-0217**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 27. januar 2011:** Tikið til eftirtektar.

**05/11** **2006-3439**

**Umsókn um keyp av grundstykki til FRískúlan í Tórshavn**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Í skrivi frá 5. august 2008 søkir skúlastýrið fyri Frítíðarskúlan í Tórshavn um at fáa eitt grundstykki til keyps frá kommununi til at byggja nýggjan skúlabygning á.

Longu tá ætlanirnar um Frítíðarskúlan vóru um at koma undir land í 2006, var stýrinum greitt, at neyðugt fór at verða at byggja ein skúla onkustaðni í Tórshavnar kommunu. Tá Frískúlin í 2007 keypti og flutti í fyrrverandi barnagarðin á Velbastað, var tað stýrinum greitt, at hendan loysnin bert var hóskandi í tvey ár. Neyðugt fór tí at verða hjá Frískúlanum at byggja nýggjan skúlabygning til skúlaárið 2009/2010 og tískil sum skjótast at fáa sær hóskandi stykki til vega. Samstundis hevur eisini alla tíðina verið greitt, at frískúlin sum ein

"non-profit" stovnur og sum skúli fyri vanligar familjur í Tórshavnar kommunu ikki kundi kappast við ríkmenn um at keypa privatar ognir.

Ynski skúlans eru, at grundstykkið skal liggja høgliga við atliti til almennu bussferðsluna og við ikki alt ov stórari frástøðu til ymisk tilboð, eitt nú írróttaøki, mentanarstovnar og onnur pláss, sum eru viðkomandi fyri næmingarnar, frálæruna og truvnaðin. Ein av høvuðstættum skúlans er eisini at knýta so stóran part av frálæruni og virksemunum, sum tilber, at náttúruni. Tí kunnu ynski skúlans samanfatast soleiðis, at best egnaða grundstykki er nærhendis náttúruni, tó í nánd av rutunetinum hjá bussleiðini og ikki ov langt frá ymiskum almennum tilboðum.

Skúlabygningurin er ætlaður at vera um 1000 fermetrar við trimum-fýra skúlastovum, felagshøli, matarhøll og góðum umstøðum til starvsfólkið. Harafturat skulu verða rúm til toilett, reingerð v.m. Sambært stýrinum eigur grundstykkið, grunda á støddina á bygninginum, at vera einar 4.500-5.000 fermetrar, soleiðis at rúm eisini verður til spælipláss, leikvøll og annað neyðugt og hóskandi útiumhvørvi. Skúlin verður so vítt gjørligt bygdur eftir grønum prinsippum, har varandi orka í mest møguligan mun verður nýtt.

Skúlastýrið hevur víst á nøkur øki, sum umrødd vóru á fundi 27. juni 2008 og søkja um at sleppa at keypa trøð ovast við Villingardalsvegin, millum Villingardalsvegin og Sundsvegin.

Ber hetta ikki til søkja tey í øðrum og triðja lagi um at sleppa at keypa trøð norðan fyri gamla skúlan á Hvítanesi ella trøð vestan fyri vinnuøki í Havnadali, oman móti Sandá.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin fyri løgdeildini mæla fíggjarnevndini at senda umsóknina til ummælis í byggi- og býarskipanar- og teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanar- og teknisku nevnd.

**361. Øki til frískúlan (Leiðslufundur 04.11.08:**

Spurningurin um at lata øki til frískúlan varð umrøddur. Trý uppskot vóru frammi. Trøð í Villingardali, trøð í Havnardali og trøð á Hvítanesi. Avgjørt varð at biðja umsitingina lýsa fyrimunir og vansar á ymsu økjunum, og somuleiðis ásetingar og framtíðarætlanir fyri økini smb. m.a. heildarætlanini.

**Ískoyti:**
21. november 2008, ymist um fyrimunir og vansar frá Lendisdeildini:

| staður | byggisamtyktarøki | matr.nr. | vídd | eigari | atkoma |
|---|---|---|---|---|---|
| Hvítanes, | | 117 | uml. | TK | Sera vánalig |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Norðanvert skúlan | E-øki til almenn endamál skúla v.m. | Hoyvíkar bygd | 3030 m² harav 1500 m² | | Sera smalir Vegir Graslíkisvøll |
| Havnardalur Akranesgøta Sandá | 4. grundumráði Við Sandá Verndarlinja máti ánni | 1083a Tórshavn | 25770 m² traðir | TK TK | Vánalig Ígjøgnum Ídnaðarøkið B3 |
| Villingadalur, Villingadalsv. /Sundsvegur | A3 og 4. grundumráði Verndarlinja við Hoydalsá | 1357a Tórshavn | 12.762 m² | TK | Sundsvegur/ Nýggja Sundsvegnum |

**Villingadalur:**
Ásetingar og framtíðarætlnir /heildarætlan:
1. krevur loyvi samb. lóg um náttúrufriðing og bygging nær við áir > 4 m breidd í botninum
2. økið liggur í A3 bústaðarøki og 4. grundumráði
3. aðrar framtíðarætlanir eru ætlanir um kampingpláss norðanvert ánna

**Fyrimunir:**
Økið liggur frítt fyri við Hoydalsá undir Villingadalsfossi og Húsareyni, nær við alfara veg, buss, kloakk og aðrar veitingarskipanir, í nýútbyggingarøki, góð lívd og gott útsýni.

**Vansar:**
Verandi vánaligu umstøður við fjósi hjá festaranum av Húsagarði, eitt umhvørvisligt ótøki. Atkoma kann skipast eftir nýggja Sundsvegnum, tá Villingadalsvegur verður stongdur av ringvegnum.
Byggisamtyktin A3 loyvir frískúla, men best hevði verið um byggisamtykarøkið var D3, til almenn endamál og stovnsøki. Økið liggur uml. 135 m hædd.

**Havnardalur.**
Ásetingar og framtíðarætlan/heildarætlan
1. krevur loyvi samb. lóg um náttúrufriðingar, um bygging nær við áir > 4 m breidd í botninum.
2. 4.Grundumráði, er lagt til landbúna, byggisamtykt má broytast til D3
3. Byggilinja er teknað upp fram við Sandá, ikki tinglýst.
4. Ferðslan til og frá skúlanum verður gjøgnum vinnuøki B3
5. Økið liggur sera ábart fyri útsynnings- og vesturættunum.

**Fyrimunir:**
Nærleikin til ánna

**Vansar:**

Byggisamtyktin loyvir bert bygging til landbúna, byggilinja er teknað á kort fram við ánni, atkoman verður ígjøgnum vinnuøki, nærmasti granni er Føroya Bjór, og útsýnið er vánaligt og ikki er veðurgott.

**Hvítanes.**
Ásetingar og framtíðarætlanir
Serstøk byggisamtykt frá 1979 broytt í 1982 er galdandi, økið er lagt av til "almenn endamál"kirkju, skúla, smákomuhús v.m.

**Fyrimunir.**
Ásetingin í byggisamtyktini fyri Hvítanes, at økið kann brúkast til skúla og at økið liggur í góðari lívd.

**Vansar:** Atkoman er sera trupul, og tilkoyringarvegirnir eru ikki góðir til meira ferðslu. Verandi gamli skúli og spæliøki við nýggjum graslíkisvølli, verða ávikavíst brúkt sum útibarnagarður og sum spæliøki hjá hvítanesbørnum. Økisvíddin er avmarkað til 1500 m².

**Ískoyti II**
Vísandi til innanhýsis fund miðjan januar 2009 á byggideildini, har øll trý økini í uppskotinum vóru umrødd, varð avgjørt ikki at taka undir við nøkrum av nevndu økjum, men ístaðin at vísa til øki nr. 33, 35 ella 37 við Karlamagnusssarbreyt, sí hjálagda avrit.
Byggjast kann í fleiri hæddum, økið er nær við høvuðsvegakervi, ítróttar- og frílendi og haga.
Leiðslufundur í dag 27. januar 2009, hevði málið til umrøðu og varð tikið undir við at arbeiða víðari eftir hesum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til svara umsøkjaranum sambært omanfyri nevndu lýsing, at øki nr. 33, 35 ella 37, vestanfyri Karlamagnussarbreyt stendur teimum í boði at ogna sær.

**Sjúrður Olsen var ikki við til hetta málið.**

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

Jógvan Arge var ikki við til hetta málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2009:** Nevndin samtykti, at umsitingin hevur fund við umsøkjaran um staðsetingina og at málið síðani verður lagt fyri nevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti II:**

**13. mars 2009 fundur** hjá teknisku fyrisiting við umsøkjarnar. Avgjørt varð at kanna neyvari tríggjar staðsetingar
1. Økið við og Rólantsgøtu við Dalin Langa, ið er lagt av til stovnsbygging.
2. Á økinum hjá Valbirni Dalsgarð undir Kongavarða.
3. Økið við Klingruna Inni á Gøtu.

**Lendisdeildin**
Lýsing av økjunum í nevnd vórðu:

| Staður | Bygsamtk. | Matr.nr. | Vídd | Eigari | Atkoma | Tekn. install |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rólantsgøta | A3 | Partur av 55-135fe | 4.700 m2 | TK | Sambindingarvegur | allar |
| Undir Kongavarða | A3 | Partur av 37-255 | 4.900 m2 | Sp/f Valbjørn Dalsgarð | Ringvegur | allar |
| Inni á Gøtu | A3 | Partur av 54-138a | 4.200 m2 | TK | Sambindingarvegur | allar |

1. Rólantsgøta liggur við endan av sambindingarvegi á lítlum kneysa við fríum útsýni eystureftir og við frílendiskílan Dalin Langa. Hinumegin dalin er ætlan at byggja íbúðarhús. Økið liggur væl fyri við góðum atkomumøguleikum. Tórshavnar kommuna eigur økið og hevur lagt tað av til dagstovn, og tekning er gjørd. Mett verður at hetta økið er best egnað.

2. Undir Kongavarða, liggur høgt hevur sera gott útsýni, góð lívd fyri vestanættum, men annars ábart og ikki so frítt fyri. Økið liggur við innkoyringina til íbúðarøkið Kongavarði. Her verður nógv ferðsla framvið av íbúgvarum, og næst við er høvuðsvegin út á Hamarin, Glyvursnes og dagstovn og til nýggja skúlan á Argjum. Økið er ikki ogn hjá kommununi.

3. Klingran, liggur dygst við nýggja sambindingarvegin Inni á Gøtu. Økið liggur millum vegin og komandi byggiøkið á heygnum sunnanfyri. Ùtsýnið er gott. Og góð lívd fyri vestanættum. Roknast kann við at har verður nógv ferðsla tá byggingin verður sett í verk. Økið er ogn hjá kommununi.

Samanumtikið verður mett at Rólantsgøta er besta boð. Atkomuvegir og lendisgøtur eru gjørdir, og mesta byggingin í økinum er framd. Haraftrat kemur tað ikki óvart á grannalagið at her verður stovnsvirksemi við til- og frákoyring. Økið ber væl eina estetiska vakra loysn. Útbyggingarmøguleikar eru ikki góðir,

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2009:** Samtykt at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at vísa á eitt hóskandi stykki.

**Ískoyti:**
Vísandi til, at økið við Rólantsgøtu upprunaliga hevur verið ætlað einum dagstovni, eigur málið um at selja Frískúlanum økið til skúlabygging, at latast Trivnaðarfyrisitingini og avvarðandi faknevnd til ummælis. Hetta tí, at byggi- og býarskipanardeildin ikki hevur aðrar staðsetingar til ein framtíðar dagstovn í økinum at vísa á.

Somuleiðis eigur kommunan at seta inn í sølutreytirnar fyri grundøkið – uttan mun til hvar tað er - at kommunan skal góðkenna byggisnið v.m. fyri at tryggja, at talan er um hóskandi bygging fyri økið og aðra bygging kring skúlan sum heild.

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur til fundin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. mai 2009:** Nevndin samtykti at umsitingin tosar við umsøkjaran um møguleikan at leggja skúlan Inni á Gøtu ella á Velbastað.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtykt hjá byggi- og býarskipanarnevndini 11. mai 2009, hevur umsitingin havt fund við umboð fyri frískúlan um staðseting av nýggjum skúlabygningi til frískúlan Inni á Gøtu.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til staðseting av frískúlanum og nýggjum kirkjugarði fyri Hoyvík (j.nr. 2007-2036), omanfyri sambindingarvegin millum Inni á Gøtu og framtíðar innkomuvegin til Tórshavn, sum framhald av Dalinum Langa.

Hendan staðsetingin uppfyllir eisini ynskini hjá umsøkjarunum um nærleika til náttúru, í nánd av rutunetinum hjá bussleiðini og ikki ov langt frá almennum tilboðum.

Ein vansi við hesi ætlan er, at byggisamtyktin fyri hetta øki var broytt til ítróttarøki í sambandi við Stórutjørnverkætlanina. Í serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn, var hetta økið lagt sum ein partur av golfvøllinum.

Umsitingin metir, at almenna byggisamtyktin fyri TK og serstaka byggisamtyktin fyri Stórutjørn eiga at verða broyttar soleiðis, at økið kann nýtast til frískúli og aðra bygging, sum kunnu staðsetast her.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at frískúlin fær ávíst grundøki víst á kortskjali, dagf. 3. februar 2010, til keyps sambært vanligum treytum, at byggja skúla á.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum um staðseting og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til, at fрískúlin fær ávíst grundøkið, sum er víst á kortskjali í málinum, dagf. 3. februar 2010, til keyps sambært vanligum treytum, at byggja skúla á, herundir við teirri treyt, at byggingin byrjar innan tvey ár.

Tilsøgnin er treytað av, at góðkenning fæst frá Innlendismálaráðnum at selja fрískúlanum grundøkið.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyri at gera tað møguligt at selja grundøkið til Frískúlan, sum samtykt var av býráðnum 25. februar, er neyðugt at broyta almennu byggisamtyktina og serstøku byggisamtyktina fyri Stórutjørn fyri hetta økið.

Hetta er partur av økinum, sum bleiv lagt til golfvøll í sambandi við Stórutjørn-verkætlanina. Samlaða økið, ið var lagt til golfvøll var uml. 205.000 $m^2$. Økið sum skal brúkast til frískúlan er uml. 5.000 $m^2$.

Umsitingin mælir til at grundøkið til frískúlan verður tikið burturúr serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn og broytt til A3-øki í almennu byggisamtyktini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at grundøkið til frískúlan verður tikið burturúr serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn og broytt til A3-øki í almennu byggisamtyktini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

06/11 **2010-2663**

**Leigutraðir, urtagarðsstykkir o.a.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Kommunan leigar út umleið 100 traðir og 35 urtagarðsstykkir umframt økir til hallir og hús hjá ymsum felagsskapum. Eisini eru inntøkur av brúksrættindum av smærri økjum og geirum.

Í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2010 var roknað við, at leigugjøldini skulu endurskoðast.

Málið um dagføring av leigugjøldunum er ikki liðugt avgreitt.

Í fíggjarætlanin fyri 2010 er roknað við eini netto inntøku uppá kr. 365.000. Fyrstu 10 mðr. eru netto inntøkurnar kr. 106.000. Fyri alt árið verða tær mettar til kr. 80.000. t.v.s. ein minni inntøka uppá kr. 285.000.

**Fíggjarnevndin 17.november 2010:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at játta 85.000 kr. av konto 20910 og at mæla býráðnum til at flyta kr. 200.000 av konto 1560, tænastumannaeftirlønir, á konto 6111.

**Býráðið 16. desember 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

07/10 **2010-2717**

**Yvirlit yvir lidnar verkætlanir og aðrar verkætlanir – um at gera upp og loka**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við viðgerina av fíggjarætlanini fyri 2011 (j. nr. 2010-0547), legði borgarstjórin á býráðsfundi hin 11. nov. 2010 fram yvirlit yvir lidnar og aðrar verkætlanir (j. nr. 2010-2717/1), – ið heitt verður á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka og síðani at leggja fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein meiriluti í býráðnum samtykti at taka undir við at heita á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka slíkar verkætlanir.

Á tekniska økinum er talan um niðanfyristandandi verkætlanir at gera upp og loka:

| § 6 | Teknisk mál fríðkan | | | | | Nevnd |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Saldo lidnar verkætlanir | 1.503 | | | BB |
| | 6275 | Kamping | 518 | | | BB |
| | 6275 | Sølupláss í Vágsbotni | 462 | | | HU |
| | | *Kongabrúgvin* | | 1.000 | | BB |
| | | *Torg við Perluna og Reinsarí'ið* | | 300 | | BB |
| | | *Søluplássið í Vágsbotni* | | 183 | | HU |
| | | *Vaglið* | | 1.000 | | BB |
| | | Nýggj saldo | | | - | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| **§ 6** | **Teknisk mál Kirjugarðar og vegir** | | | | | **Nevnd** |
| | | Saldo lidnar verkætlanir | 2.126 | | | TN |
| | | *Viðskiftahús í Kirkjubø* | | 1.000 | | TN |
| | | *Frílendi til borgaran* | | 226 | | TN |
| | | *Glyvursvegur við brúgv* | | 400 | | TN |
| | | *Ferðslutrygdarætlan* | | 500 | | TN |
| | | Nýggj saldo | | | - | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við at loka lidnar og aðrar verkætlanir, og at játta peningin til aðrar verkætlanir sambært omanfyri standandi yvirliti.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 23. november 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Marin Katrina Frýdal og Jan Christiansen vóru ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Tekniska nevnd 2. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.
Levi Mørk var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og loka lidnar og aðrar verkætlanir, og at játta peningin til aðrar verkætlanir sambært omanfyri standandi yvirliti.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 27. januar 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**08/10** **2010-2717**

## Yvirlit yvir lidnar verkætlanir og aðrar verkætlanir – um at gera upp og loka

**Málslýsing - samandráttur**
Í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini fyri 2011 (j. nr. 2010-0547), legði borgarstjórin á býráðsfundi hin 11. nov. 2010 fram yvirlit yvir lidnar og aðrar verkætlanir (j. nr. 2010-2717/1), – ið heitt verður á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka og síðani at leggja fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina uppskot um at nýta avlopið til nýggjar verkætlanir sbr. skjali um uppgerð yvir lidnar verkætlanir og nýggjar verkætlanir.

Ein meiriluti í býráðnum samtykti at taka undir við at heita á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka slíkar verkætlanir.

Á trivnaðarøkinum er talan um niðanfyri standandi verkætlanir at gera upp og loka:

| | | | | Nýggjar verk. | Saldo |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 2** | **Almanna- og heilsumál** | | | | |
| | 2775 | Saldo lidnar verkætlanir | 488 | | |
| | 2275 | Nýggj læknahøli | 250 | | |
| | 2775 | Vardar íbúðir | 1.015 | | |
| | 2775 | Røktarheim yvir við strond | 1.064 | | |
| | | *Køkur Ellisheim* | | 1.850 | |
| | | *Kommunulæknaskipanin* | | 950 | |
| | | Nýggj Saldo | | | 17 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at taka undir við at loka lidnar og aðrar verkætlanir, og at játta peningin til aðrar verkætlanir sambært omanfyri standandi yvirliti.

**Sosiala nevnd 7. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 27. januar 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

09/10 **2010-2717**

**Yvirlit yvir lidnar verkætlanir og aðrar verkætlanir – um at gera upp og loka**

**Málslýsing - samandráttur**
Í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini fyri 2011 (j. nr. 2010-0547), legði borgarstjórin á býráðsfundi hin 11. nov. 2010 fram yvirlit yvir lidnar og aðrar verkætlanir (j. nr. 2010-2717/1), – ið heitt verður á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka og síðani at leggja fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina uppskot um at nýta avlopið til nýggjar verkætlanir sbr. skjali um uppgerð yvir lidnar verkætlanir og nýggjar verkætlanir.

Ein meiriluti í býráðnum samtykti at taka undir við at heita á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka slíkar verkætlanir.

Á trivnaðarøkinum er talan um niðanfyri standandi verkætlanir at gera upp og loka:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **§ 3** | **Børn og ung** | | | | |
| | | Saldo lidnar verkætlanir | - | | |
| | 3175 | Dagstovnur Hoyvíkshagi suður | 990 | | |
| | | Tórsvøllur | | 462 | |
| | | *Høllin í Kollafirði* | | | |
| | | Nýggj saldo | | | 528 |
| **§ 4** | **Undirvísing** | | | | |
| | | Saldo lidnar verkætlanir | 844 | | |
| | | *Svimjihylur hølir til svim.flg* | | 844 | |
| | | Nýggj saldo | | | - |
| **§ 5** | **Mentan og frítíð** | | | | |
| | | Saldo lidnar verkætlanir | 866 | | |
| | | *Tórsbreyt* | | 300 | |
| | | *Spælipláss Grasagarð* | | 150 | |
| | | *Svimjihylur nýggir plintar* | | 350 | |
| | | Nýggj saldo | | | 66 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við at loka lidnar og aðrar verkætlanir, og at játta peningin til aðrar verkætlanir sambært omanfyri standandi yvirliti tó við teimum broytingum, at játtaðar verða í alt kr. 740.000 í

stuðli til Dansifrøi (sí 2002-2686) av § 3 kr. 528.000, av § 4 kr. 146.000 og av § 5 kr. 66.000, og at játtanin til høli hjá Havnar Svimjifelag á § 4 lækkar sum avleiðing av hesum við kr. 146.000 til kr. 698.000. Saldo á øllum greinum verður eftir hetta kr. 0.

**Mentamálanevndin 1. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 27. januar 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**10/11** **2010-1161**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2010**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri apríl 2010 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2010:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai, juni, juli og august 2010 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 9. september 2010:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september 2010 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17.november 2010:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 25. november 2010:** Einmælt góðkent.

**Ískoyti:**

Roknskapurin fyri oktober 2010 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri november 2010 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Góðkent, tó samtykt at biðja um frágreiðing um tey øki, ið hava hall.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt góðkent.

**11/11** **2010-2637**

**Umsókn frá Verkfrøðingastovuni vegna Sp/f matr. nr. 1228a, um broyting av byggisamtyktini fyri ovasta partin av ognunum 1227a og 1227a, Tórshavn.**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Ognirnar matr. nr. 1227a og 1228a liggja niðan ímóti Oyggjarvegnum og økinum til viðarlund, niðanfyri Hotel Føroyar, eru uml. 6.800 $m^2$ og uml. 9.000 $m^2$ harav eru uml. 2/3 í A1-øki og restin í 4. grundumráði.

Ætlanin er at gera eina sethúsaútstykking, sum fevnir um báðar ognirnar við atgongd frá Oyggjarvegnum, har sum Skotarók og Írarók hava vegatgongd í dag.

Í seinastuni hava fleiri fyrispurningar verið um útstykkingar í grannalagnum, niðan frá Marknagilsvegnum. Kommunan hevur eisini arbeitt við at skipa eina útstykking í hinum endanum at hesi røðini av traðum, yviri ímóti Dánjalstrøð.

Av hesi røðini av traðum er tað bert Kongsgil, sum er liðugt útstykkjað.

Grundin til at markið millum umráðispartarnar liggur her, er møguliga at ætlan var at gera ringveg her. Hesar ætlanir vóru tó sleptar og Marknagilsvegurin var breiðkaður ístaðin.

Býarskipanardeildin mælir til at byggisamtyktin verður broytt fyri allar traðirnar soleiðis at markið millum umráðispartarnar liggur á matrikulmarkinum.

Av tí at matr. nr. 1229 er skógfriðað eiga friðingarmyndugleikarnir at verða hoyrdir ímeðan broytingin liggur frammi.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin verður broytt, soleiðis at markið millum A1-økið og 4. grundumráði fylgir matrikulmarkinum sambært kortskjali 03.01.11, j.nr 2010-2637/2.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**12/11** **<u>2010-2565</u>**

**<u>Umsókn frá Vagn Mohr Mortensen og Tinu Ziska um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 108b á Hvítanesi.</u>**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Matr. nr. 108b liggur niðarlaga í bygdini og er 954 m$^2$ til støddar, harav liggja uml. 380 m$^2$ í B-bústaðarøki og restin liggur í 4 grundumráði.

Avmarkingin millum B-økið og 4. grundumráði sær rættiliga tilvildarlig út í hesum økinum. Møguliga er grundin til hetta, at økini ikki eru regulerað eftir innangarðsútskiftingina á Hvítanesi.

Í sambandi við broytingar í økisskipan verður markið millum umráðispartar sum meginregla lagt á matrikulmark, soleiðis at ein ogn ikki liggur í fleiri umráðispørtum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin verður regulerað, her soleiðis at markið millum B-bústaðarøki og 4. grundumráðið fylgir matrikulmarkinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**13/11** **<u>2010-2252 KF</u>**

**<u>Umsókn frá arvingunum eftir Poul N. Johansen og Ingibjørg Geyti Johansen um at broyta byggisamtyktina fyri tann partin av matr. nr. 290a á Signabø sum liggur niðanfyri vegin.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Ognin matr. nr. 290a á Signabø liggur næstan øll í 4. grundumráði – bert ein lítil partur liggur í neystaøki.

Ynski er um at broyta byggisamtyktina partvís til sethúsaøki, partvís til frílendi og partvís til neystaøki.

Í 2002 søktu somu arvingarnir um at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini fyri alla ognina matr. nr. 290a á Signabø frá landbúnaðarøki til sethúsaøki og í øðrum føri bert omanfyri vegin (mál nr. 2002-1185).

Av tí at byggisamtyktin fyri Kollafjørð tá var undir endurskoðan, var hendan broytingin ikki framd fyrr enn í 2005 og bert fyri økið omanfyri vegin.

Í sambandi við endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Kollafjørð, var ein heildarætlan fyri framtíðar víðkanir av byggisamtyktini fyri Kollafjørð gjørd (j.nr. 2002-2500).

Í hesi heildarætlan er einki sethúsaøki niðanfyri høvuðsvegin á Signabø. Í uppruna byggisamtyktini fyri Kollafjørð, var heldur eingin partur niðan fyri høvuðsvegin á Signabø bústaðarøki, hóast nøkur sethús standa her.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at ganga umsókníni á møti vísandi til at hetta ikki er í samsvar við heildarætlanina fyri Kollafjørð.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. november 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. november 2010:** Málið bleiv beint aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2011:** Nevndin heldur fast við samtyktina 1. november 2010, sum er endalig avgerð.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**14/11** **<u>2010-2945</u>**

**Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við Marknagil**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**

Í sambandi við skipan av økinum við Marknagil til Skúladepil, ítróttarhøll og grundøki til framtíðar kommunuskúla, hevur býarskipanardeildin gjørt uppskot til regulering av almennu byggisamtyktini fyri hetta økið.

Ætlaðu reguleringarnar eru:

-markið millum D3 og D1 er flutt uml. 30 m norðureftir til matrikulmarkið millum matr. nr. 1173a og 1174.

-markið millum D3 og C3 flutt suðureftir soleiðis at matr. nr. 1099 og 1100 verður broytt frá C3 til D3.

-markið millum C3 og D2 flutt eystureftir til matrikulmarkið millum 917 og 918b.

-markið millum C3 og D3 verður flutt soleiðis at øll ognin matr. nr. 1101 verður C3 øki.

-markið millum C3 og A1 verður regulerað eftir nýggja Marknagilsvegnum

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina sambært kortskjølum dagfest 15.12.2010

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**15/11** **<u>2010-2946</u>**

**<u>Serstøk byggisamykt fyri økið við Marknagil</u>**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Í sambandi við skipan av økinum við Marknagil til Skúladepil, ítróttarhøll og grundøki til framtíðar fólkaskúla, hevur býarskipanardeildin gjørt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri hetta økið.

Serstaka byggisamtyktin er gjørd sambært broytingaruppskotinum av almennu byggisamtyktini j. nr. 2010-2945.

Umframt økið til Skúladepil, fólkaskúla og ítróttarhøll, er økið eisini lagt út til miðstaðarbygging. Harafturat eru vegatgongdir til økið, býlingsvegir í økinum og parkeringspláss útlagt.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri økið við Marknagil.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**16/11** **2009-0794**

**Ársins William**

Í árinum 2000, tá 100 ár vóru liðin, síðani heiðursborgarin William Heinesen varð borin í heim, mælti ein arbeiðsbólkur til, at býráðið læt eina árliga listafólkavirðisløn, nevnd **Ársins William**.

William Heinesen, sum hevur gjørt Havnina kenda um allan heim, var listamaður á fleiri ymiskum økjum og virkin í skaldskapi, myndlist, tónleiki og sjónleiki.

Mælt verður til, at Tórshavnar býráð á hvørjum ári á føðingardegi skaldsins letur **Ársins William**.

Upphæddin á starvslønini, sum sambært grein 3 í reglugerðini svarar til lønina hjá lærara í fólkaskúlanum í 21. lønarflokki, stigi 1, er pr. 1. oktober 2009 kr. 24.016,70 um mánaðin. Harumframt verður frítíðarískoyti goldið. Starvslønin er uttan pensión.

**Reglugerð**

**fyri**

**William Heinesen starvslønina**

**Grein 1**

William Heinesen var virkin í skaldskapi, myndlist, tónleiki og sjónleiki, og við sínum listaliga virki gjørdi hann Havnina kenda um allan heim. Honum til heiðurs letur Tórshavnar býráð á hvørjum ári starvsløn, ið ber navn hansara.

**Grein 2**

Starvslønin, kallað "Ársins William", verður latin listafólki, ið hevur skapað verk, sum hevur havt týdning fyri føroyska list og listaligu menningina í høvuðsstaðnum

ella til listafólk, sum hava víst serstakar gávur, ið eiga at fáa góðar umstøður at mennast. Listafólkið skal hava bústað í Tórshavnar kommunu.

**Grein 3**

Starvslønin samsvarar við eina ársløn hjá lærara í fólkaskúlanum í 21. lønarflokki, stigi 1, umframt frítíðaríiskoyti. Starvslønin verður goldin listafólkinum við einum tólvtaparti hvønn mánað í eitt ár.

**Grein 4**

Býráðið tilnevnir nevnd við fimm limum at gera av, hvør skal fáa ársins starvsløn. Nevndin verður vald av nýggjum eftir hvørt býráðsval.

Trivnaðarstjórin er fastur limur í nevndini og er formaður. Býráðið velur 2 limir, og Listafólkasamband Føroya velur tveir limir í nevndina. Mentamáladeild býráðsins letur skrivara og kallar saman til fundar í nevndini.

**Grein 5**

Starvslønin, sum ikki kann søkjast, verður latin á føðingardegi William Heinesens, tann 15. januar á hvørjum ári. Nevndin er tó ikki bundin at lata virðisløn á hvørjum ári. Formaðurin í mentamálanevndini handar listafólkinum ársins William saman við skjali, har tilskilað er, hvørjar grundir nevndin hevði fyri at lata honum ella henni starvslønina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við reglugerðini, og at virðislønin á fyrsta sinni verður latin í januar 2012.

**Mentamálanevndin 1. desember 2010:** Málið varð umrøtt og verður viðgjørt aftur á fundi í januar 2011.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at broyta navnið til "William Heinesen starvslønin".

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**<u>Uppískoyti:</u>**

Reglugerðin fyri William Heinesen starvsløn verður soljóðandi:

***Reglugerð***

***fyri***

***William Heinesen starvsløn***

***Grein 1***

*William Heinesen var virkin í skaldskapi, myndlist, tónleiki og sjónleiki, og við sínum listaliga virki gjørdi hann Havnina kenda um allan heim. Honum til heiðurs letur Tórshavnar býráð á hvørjum ári starvsløn, ið ber navn hansara.*

***Grein 2***

*Starvslønin, kallað "William Heinesen starvsløn", verður latin listafólki, ið hevur skapað verk, sum hevur havt týdning fyri føroyska list og listaligu menningina í høvuðsstaðnum, ella til listafólk, sum hava víst serstakar gávur, ið eiga at fáa góðar umstøður at mennast. Listafólkið skal hava bústað í Tórshavnar kommunu.*

***Grein 3***

*Starvslønin samsvarar við eina ársløn hjá lærara í fólkaskúlanum í 21. lønarflokki, stigi 1, umframt frítíðaráskoyti. Starvslønin verður goldin listafólkinum við einum tólvtaparti hvønn mánað í eitt ár.*

***Grein 4***

*Býráðið tilnevnir nevnd við fimm limum at gera av, hvør skal fáa ársins starvsløn. Nevndin verður vald av nýggjum eftir hvørt býráðsval.*

*Trivnaðarstjórin er fastur limur í nevndini og er formaður. Býráðið velur 2 limir, og Listafólkasamband Føroya velur tveir limir í nevndina. Mentamáladeild býráðsins letur skrivara og kallar saman til fundar í nevndini.*

***Grein 5***

*Starvslønin, sum ikki kann søkjast, verður latin á føðingardegi William Heinesens, tann 15. januar á hvørjum ári. Nevndin er tó ikki bundin at lata virðisløn á hvørjum ári. Formaðurin í mentamálanevndini handar listafólkinum William Heinesen starvsløn saman við skjali, har tilskilað er, hvørjar grundir nevndin hevði fyri at lata honum ella henni starvslønina.*

**Býráðið 27. januar 2011:** Tikið av skrá.

**17/11** **<u>2010-2343</u>**

**<u>Uppskot til navn til nýggjan veg í Kollafirði</u>**

**Lýsing av málinum:**
Lendisdeildin hevur heitt á gøtunavnanevndina um at koma við uppskoti til navn. Í áheitanini stendur:

"Í sambandi við útstykking av matr. nr. 175a í Kollafirði (mál nr. 2006-3451) er gjørdur ein nýggjur vegur, sum er vístur á hjálagda korti. Lendisdeildin vil heita á gøtunavnanevndina um at koma við uppskoti til navn.

**Gøtunavnanevndin 9. desember 2010:** Gøtunavnanevndin mælir til at nevna vegin *á Rætt.*

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**18/11** **<u>2005-1369</u>**

**<u>Møgulig søla av sethúsunum, Ovaragøta 46, matr. nr. 1vi, Hoyvík.</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Kommunan hevur í fíggjarætlanini fyri 2010 lagt upp fyri inntøkum frá sølu av føstum ognum

Fyrisitingin hevur í hesum sambandi mælt til at selja omanfyri nevndu ogn.

Kommunan keypti í 2005 húsini fyri 1,725 mill. kr.

Húsini eru síðani umvæld og umbygd og standa kommununi í kr. 1,953 mill. kr.

Síðani desember 2006 hevur Almanna- og Heilsumálaráðið leigað húsini.
( til stuðulsfólkaskipanina fyri børn við serligum tørvi )

Leigarin rindar kr. 8.000,- pr. mðr. Fyri leiguna + olju og el-nýtslu.

Sambært virðismeting frá Sp/F Protek, dagfest 28 apríl í ár, hava húsini eitt mett bygningsvirði á kr. 2.350.000.000,- og eitt mett søluvirði á kr.2.200.000,00 ( Virðmismeting journaliserað undir 2005-1369/22 SG )

Húsini eru bygd umleið ár 2000. Talan er um eini eittplanshús sum eru til støddar 160 fermetrar, og er grundøki 478 fermetrar.

Húsini verða mett at vera nýmótans og í góðum standi.

Garður er kring húsini og er økið kring húsini asfalterað til 4. bilpláss. Harumframt er urtagarður við trøðum.

**Tilmæli:**
Málsviðgerðin í løgdeildini og kommunustjórin mæla til at lýsa húsini í fríðari sølu til hægstbjóðandi.

Minsta boð 2.200.000 kr.

Samstundis verður leigusáttmálin við Almanna- og Heilsumálaráðið uppsagdur við styttst møguligari freist, sum í hesum føri er 3. mánaðar.

Leigarin fær tó tilboð um at kunna vera í húsunum, meðan húsini standa á sølulista.

Mælt verður til at selja ognina via húsameklara, og skal ognarlýsing eisini umbiðast. Ognin kemur at liggja á ognartorginum á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu, við tilvísing til húsameklara.

**Fíggjarnevndin 9. september 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum til at lýsa húsini í fríari sølu til hægstbjóðandi við einum minsta boði á kr. 2.200.000,00.

**Býráðið 16. september 2010:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Jan Christiansen, um at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at minsta boði er 2.000.000, fall við 6 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Nærverkið/Almannaráðið ynskir at keypa ognina fyri meting kr. 2.200.000,00.

Kommunan hevur givið Almannaráðnum freist til 1. desember 2010, at geva kommununi endaligt boð um møguligt keyp.

Almannaráðið/Nærverkið, hevur nú vent sær til kommununa, og boða frá, at Almannaráðið ynskir at keypa húsini í Ovarugøtu fyri kr. 2.200.000,00

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at selja húsini til Almannaráðið/Nærverkið fyri 2.200.000,00

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at selja húsini til Almannamálaráðið fyri 2.200.000,00.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**19/11** **2009-1257**

**Fyrispurningur frá Búnaðarstovuni um Tórshavnar kommuna hevur áhuga í at yvirtaka ein part (lut nr. 2) av matr. nr. 107a, Nólsoy.**

Búnaðarstovan hevur vent sær til Tórshavnar kommunu við fyrispurningi um, hvørt kommunan hevur áhuga í at yvirtaka ein part (lut nr. 2) av matr. nr. 107a, Nólsoy, sum er eitt øki á 463 fermetrar mitt í bygdini (beint omanfyri handilin á Mýruni).

Á stykkinum eru ein súrhoyggjbrunnur, eitt fjós, og ein annar gamal grótlagaður bygningur, sum er í ringum standi.

Øki er partur av eina festinum í Nólsoy, men Búnaðarstovan er sinnað at taka øki burturúr festinum, um kommunan hevur áhuga í at yvirtaka tað.

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á løgdeildini mælir til, at málið verður viðgjørt av nólsoyarnevndini, sum sambært kommunustýrisskipanini vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar í Nólsoy at gera.

**Nólsoyarnevndin 12. mai 2009:** Nevndin mælir til at kommunan yvirtekur stykkið, møguliga til savn.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2009:** Samtykt at taka upp samráðingar við Búnaðarstovuna um at taka av tilboðnum.

**Nólsoyarnevndin 2. mars 2010:** Kunnað varð um málið. Heitt verður á løgdeildina at rykkja eftir málinum.

**Ískoyti:**
Búnaðarstovan hevur boðið kommununi at keypa umrødda øki, nú matr. nr. 107c, vídd 463 m², fyri 30.755,81 kr.

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at keypa ognina.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at keypa ognina.

**Býráðið 27. januar 2011:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein og Jan Christiansen.

**20/11** **<u>1999-0345</u>**

**<u>Høllin á Hálsi</u>**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Á fundi í býráðnum 23. september 2004 varð m.a. samtykt at gera eina byggitekniska meting av høllini.

Byggideildin hevur havt samstarv við BBP Arkitektar A/S um at útbyggja og umvæla høllina. Byggideildin hevur á fundi í býráðnum 30. mars 2006 kunnað um ætlaðu umbyggingina av Ítróttarhøllini á Hálsi.

Í uppskotinum er ein kostnaðarætlan og ein tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at fara undir at gera hesa verkætlanina so skjótt sum til ber. Tað kann ikki metast ráðiligt at halda fram við at lappa uppá verandi høll. Ei heldur má tað metast ráðiligt at fara undir at umvæla høllina bert fyri at fáa hana í brúkiligan stand tó uttan at tillaga hana til øktan tørv og krøv til nýtslu.

Høllin á Hálsi hevur altíð staðið sum ímyndin av føroyskum innanduraítrótti, harumframt at vera stoltleikin fyri samkomu- og ítróttarvirksemi í Tórshavn. Hetta eigur Tórshavnar kommuna, sum landsins høvuðsstaður at leggja seg eftir at kunna siga um Høllina á Hálsi framyvir.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir mentamálanevndini til at taka undir við tilráðingini frá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Nevndin var á staðnum og var víst runt í høllini.

**Uppískoyti/tilmæli:**
Høllin, ið er yvirtikin av Tórshavnar kommunu fyrst í 2005, er niðurslitin, og tørv-ar átrokandi ábøtur. Fyri at fáa sum mest burtur úr eini so umfatandi umvæling, hava vit mett rættast eisini at hava við í hesum arbeiði eina dagføring av høllini, ið alt annað enn líkur krøvini, ið eru til eina tílíka høll í dag. Tí fyriliggur eitt skitsuuppskot, sum tekur støði í hesum. Atlit eru eisini tikin til, at hon framhald-andi, eftir at arbeiðið er gjørt, fer at verða "høllin" í Føroyum. Býararkitekturin hevur sagt um skitsuuppskotið, at hetta er eitt av teimum betru.

Í skitsuuppskotinum er samantvinna umbygging, uppíbygging og um-væling. Sambært kostnaðarmetingini hjá BBP-arkitektum kostar arbeiðið kr. 32.850.000 (danskir prísir, primo 2006)

Afturat hesum kemur projekterings- og ráðgevaraútreiðslur, kr. 3.942.000 (12% av 32 mill kr.).

Av tí at uppskotið ikki bert inniheldur viðlíkahald, men eisini uppíbygging v.m., halda vit tað er rætt eisini at býta samlaða metingina upp í tveir partar. Annar er umvælingarparturin og hin er uppí- og umbyggingar parturin.

Út frá kostnaðarmetingini kemur fram, at kostnaðurin fyri alt arbeiðið er í "føroyskum kr" 37.777.500 mill. kr. Deila vit hetta upp í áður umtalaðu partar, fáa vit hesa uppdeiling:

| | | |
|---|---|---|
| Umvæling | kr. | 21.903.095 |
| Uppí- og umbygging | - | 15.874.405 |
| Samlað | kr. | 37.777.500 |

Í fjør játtaði býráðið 2,5 mill. kr. á konto 82 til Høllina á Hálsi at gera umvælingar fyri í 2006.

Býararkitekturin mælir til at tikið verður av øðrum av niðanfyri standandi tilmælum. Bæði ganga uppá at fáa sett projekteringsarbeiði í gongd nú.

Í tí fyrra tilmælinum verður mælt til, at arbeiðið verður gjørt út í eitt. Hetta hevur við sær, at eingin kann brúka høllina í byggitíðini, sum ætlandi verður liðug í september 2008.

Tað seinra mælir til, at arbeiðini verða gjørt í 4 byggistigum, soleiðis at yvir eitt rímiligt tíðarskeið stendur høllin liðug, sum skitsuuppskotið leggur upp til.

**1. tilmæli**

at projekteringin av skitsuuppskotinum verður gjørt av BBP-arkitektum, sum hava tillagað eina nýggja tíðarætlan. Teir kunnu byrja uppá projekteringina miðjan august í ár og hava hana lidna miðjan mai 2007. Arbeiðið kann byrja fyrst i juli 2007 og halda fram, til tað er liðugt, áðrenn hondbóltskappingin byrjar aftur í september 2008.

at játtanin til konto 82 verður hækkað við teim knapt 22 mill. kr., og tær írestandi knapt 16 mill. kr. sum íløga ella tiknar sum lán. Projekteringskostnaðurin verður goldin av teim 2,5 mill. kr., sum eru á konto 82, og tær írestandi 1,4 mill. kr. verða deildar soleiðis, at 1 mill. fer til konto 82 og 0,4 mill. kr. sum íløga ella lán. Sett upp í skema sær tað soleiðis út yvir 2 fíggjarár:

| | | |
|---|---|---|
| Hækka játtaninna til konto 82 | kr. | 21.903.095 |
| Partur av projekterings og ráðgeving | - | 1.000.000 |
| Samlað hækking til konto 82 | kr. | 22.903.095 |
| | | |
| Játtan til íløgu ella at upptaka lán | kr | 15.874.405 |
| Partur av projektering og ráðgeving | - | 442.000 |
| Samlað íløga ella lántøka | kr. | 16.316.405 |

Hækkan av játtan til konto 82 og játtan til íløgu ella lántøka verða gjørd yvir eitt tvey ára skeið, so hvørt sum tørvur er á peningi.

| | | |
|---|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2007 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. | 12.000.000 |
| Og íløga ella lántøka verða gjørd fyri fíggjarárið 2007 við | kr. | 8.000.000 |
| Fyri fíggjarárið 2008 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. | 11.000.000 |
| Og íløgan ella lántøka verður gjørd fyri fíggjarárið 2008 við | kr. | 9.000.000 |




Omanfyri sæst tíðaraksin fyri projektering og byggitíðina, um arbeiðið verður gjørt út í eitt.

**2. tilmæli**
Í øðrum lagið verður mælt til at projektið verður gjørt liðugt, soleiðis at partar av arbeiðnum kunnu longu byrja í 2007. Arbeiðið kann tá leggjast soleiðis tilrættis, at tað verður boðið út í størri og minni bitum alt eftir tí, sum er best byggitekniskt, og sum pengar verða settir av til.

<u>at</u> peningur verður settur av soleiðis, at projekteringin kann gerast liðug av BBP-arkitektum miðskeiðis í apríl 2007. Hetta fyri at umvælingararbeiðið kann gerast við støði í tí lidna projektinum, soleiðis at arbeiðið verður gjørt í størri og smærri bitum.

<u>at</u> peningur verður settur av til at gera 1. byggistig í fyrstu atløgu, sum umfatar rúmini á eystursíðuna fyrst. Hetta inniheldur at skifta takið, hækka gólvið á hædd við vallargólvið, umvæla og broyta skiftirúmini, wc rúmini og harvið eisini gera kloakkina á nýggjum og asfaltera gongubreytuna. Framsíðan skal gerast eftir tí nýggja uppskotinum, tvs. skifta klædningin út og skifta og broyta vindeyguni og úthurðarnar. Seta nýggja takrennu og rennustokk upp. Hesi arbeiði kunnu gerast við at hækka játtanina til konto 82 við 9 mill. kr. til fíggjarárið 2007.

Ein møgulig langtíðar ætlan kundi verið hendan.

**1. byggistig**
Umvæling og broyting av hølum, ið liggja úti við eystur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar. Takið skal eisini skiftast.

**2. byggistig**
Útbyggja endan norðureftir, við øllum.

**3. byggistig**
Útbyggja endan suður eftir við øllum.

**4. byggistig**
Taka niður áskoðarabeinkirnar og flyta vøllin inn í mittuna. Gera nýggj áskoðarapláss og umskapa rúmini, sum liggja út til vestur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at 2,5 mió. kr., sum eru játtaðar til umvælingar av høllini 2006, verða nýttar til projektering av umvæling og umbygging, sambært uppskoti frá BBP Arkitektar A/S, februar 2006.
Eisini samtykt at viðgera málið aftur í mentamálanevndini eftir summarfrítíðina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini vóru á fundinum og greiddu frá.

Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**Nýtt:**
Kommunan hevur arbeitt við einum projektið, ið fór at kosta 40 mill kr. umframt projekteringsútreiðslur.

Projekteringin er komin væl áleiðis og sambært sáttmála millum arkitektavirkið og Tórshavnar kommunu (TK) skal projektforslagið góðkennast av TK. Hetta liggur nú klárt til góðkenningar

Samlaði kostnaður fyri projektið er kr 47.680.000 við prístalsregulering og projektering.

Arbeiði gerast í 4 byggistigum.

| | |
| --- | --- |
| 1. byggistig: | 1. februar 2008 – 31.oktober 2008 |
| 2. byggistig: | 1. januar 2009 – 1. februar 2010 |
| 3. byggistig: | 1. apríl – 27. august 2010 |
| 4. byggistig: | 1. september – 30. juni 2011 |

Arbeiði verður fíggja av konto 90 soleiðis:

| | |
| --- | --- |
| Áður játtað, | 2.500.000 mill kr. |
| At játtað fyri 2007 | 6.000.000 mill kr |
| At játtað fyri 2008 | 6.415.000 mill kr |

| | |
|---|---|
| At játtað fyri 2009 | 14.326.680 mill kr |
| At játtað fyri 2010 | 12.829.240 mill kr |
| At játtað fyri 2011 | 5.599.080 mill kr |

Býararkitekturin mælir til at projektuppskotið, tíðarætlan og fíggingar-háttur verða góðtikin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum. Somuleiðis verður mælt til at seta bygginevnd fyri verkætlanina, sambært "Politisku/fyrisitingarligu mannagondir fyri verkætlanir"

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
5 byggifyritøkur vóru innboðnar til at prekvalifisera seg til at bjóða uppá út-og umbyggingina av Høllini á Hálsi. Freistin at lata inn upplýsningar um fyritøkuna varð 6. mars kl 14.00. Av teim 5 boðnu, lótu 4 fyritøkur inn tilfar, og vóru tær allar góðkendar.

Lisitatiónin varð 28. apríl 2008 kl 10:00
Hesi tilboð komu inn

| Fyritøka | 1 byggistig | 3 byggistig |
|---|---|---|
| J & K Petersen Contractors | Einki boð | Einki boð |
| Búsetur Sp/F | kr 58.798.462,80 | kr 64.143.777,60 |
| E.Pihl & Søn Føroyar P/F | kr 64.341.329,28 | kr 69.964.259,00 |
| MT Højgaard Føroyar P/F | kr 70.810.793,03 | kr 76.310.793,03 |

Ráðgevarin BBP-arkitekter, mettu at øll innkomnu tilboð vóru kontosiónsmessig. Víðari mæltu ráðgevin til at tikið varð av tilboðnum frá Búsetur, og at arbeiðið skuldi gerast í einum byggistigi.

Bygginevndin gjørdi hetta tilmæli.

Ein meiriluti í bygginevndin, mælir frá at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 58.798.462,00 kr, fyri at gera arbeiði í einum. Somuleiðis mælir ein meiriluti frá, at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 64.143.777,00 kr, fyri at gera arbeiðið í stigum.

Grundgevingin fyri frámælinum er, at játtaðar eru bert 48 mill. kr. til at gera arbeiðið í stigum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini vísandi til at rúm ikki er fyri verkætlanini á konto 90.

**Mentamálanevndin 3. desember 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 29. desember 2008:** Atkvøtt var um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen

**Uppískoyti:**
Høllin, sum Tórshavnar kommuna yvirtók í 2005, er niðurslitin og tørvar átrokandi ábøtur. Arbeitt hevur verið við at fara undir útbygging av høllini, men býráðið samtykti 29. desember 2008, at arbeiðið verður ikki gjørt í hesum umfari.

Tørvurin á umvælingum í høllini er stórur, og tí verður neyðugt at gera eina tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at framflyta kr.100.000 av játtan til umbygging av høllini á Hálsi til at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum við kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**Nýtt**:

Tørvsmetingin av bráfeingis umvælingum og kostnaðarmeting er nú gjørd. Eystursíðan treingjur mest til ábøtur. Talan er her um at umvæla/skifta út umklæðingar- og brúsurúm, klædning og toilettir. Kostnaðarmetingin er sett upp í trimum punktum, sí skjálið frá HMP-Consult, dagfest 3. november 2009.

Her verður tikið saman um metingina:

| | | |
|---|---|---|
| Brúsu- og umklæðingarrúm | kr. | 3.484.100 |
| Toilettir | kr. | 861.300 |
| Arbeiðstøka samlað | kr. | 4.895.400 |
| Óvantað 15% | kr. | 734.310 |
| Projektering og eftirlit | kr. | 675.565 |
| | | |
| Samlað uttan mvg | kr. | 6.305.275 |
| Mvg 6,25% | kr. | 390.927 |
| | | |
| Samlað við MVG | kr. | 6.696.202 |

Eftir at hesar ábøtur eru gjørdar, treingir gólvið til at skiftast. Tað er í sera ringum standi, og krevur nógv dagligt viðlíkahald. Men tá hugsað verður um at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða tá takið verður skift.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,4 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (j. nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Ískoyti/tilmæli:**
Fyri at gera bráðfangis umvælingar lidnar – mettar til 6,7 mió. kr. – mæla kommunustjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin til at játta 3,0 mió. kr. afturat av undirkonto 5776 í fíggjarætlanini fyri 2010 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 17. november 2009:** Nevndin tók undir við tilmælinum um netið.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælunum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

**Ískoyti:**

Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Tekniski stjórin og býararkitekturin greiddu frá málinum. Sáttmáli verður í næstum gjørdur við HMP Consult um ráðgeving og projektering. Projekteringin tekur upp til tveir mánaðir, og mælt verður til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión í summar.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Nýtt:**
Lisitatiónin var 22. des. 2010 og tilboðini vóru hesi:

| | |
|---|---|
| ÁTS S/pf. | 6.117.725,56 kr. |
| Karstin A. Joensen S/pf. | 6.183.979,25 kr. |
| Valbjørn Dalsgarð S/pf. | 6.302.015,96 kr. |
| Bjarni Poulsen S/pf. | 6.343.814,48 kr. |
| Búsetur S/pf. | 6.545.180,00 kr. |
| Húsavarðatænastan S/pf. | 6.678.556,15 kr. |

Metingin hjá HMP-Consult 6.725.000,00 kr.

HMP-Consult hava kannað tilboðini, og mæla til at taka upp samráðingar við ÁTS, sum áttu lægsta tilboðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við ÁTS.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini 12. januar 2011 og heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við ÁTS.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**21/11** **2008-1341**

**Lendi til vatnbyrging og atkomuveg í Kollafirði**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Í sambandi við komandi vatnbyrging, sí j.nr. 2001-2540, sum Tórshavnar kommuna hevur ætlanir at gera ovarliga í Sjóvar- og Todneshaga í Kollafirði, verður neyðugt hjá kommununi at tryggja sær atkomumøguleika og lendi til nevndu byrging.

Í dag er koyrandi niðan til tveir vatngoymslubrunnar, ið standa í kotu 90. Hesin vegur er lutvíst kommunalur, lutvíst landsvegur og lutvíst privatur.

Hesir vatngoymslubrunnar við tilhoyrandi atkomuvegi, vóru gjørdir av Kollafjarðar kommunu stutt undan kommunusamanleggingini í 2000, og okkum vitandi varð í hesum sambandi bert munnlig avtala gjørd millum kommununa og festaran av Todneshaga.

Vegurin, ið skal gerast frá nevndu goymslubrunnum og niðan til byrgingina í kotu 180, kemur at ganga niðan ígjøgnum Sjóvar haga, sum er ogn hjá Búnaðarstovuni. Sí hjáløgdu kort, jr.nr. 2001-2548/60 og 2001-2548/61

Kommunan kann ogna sær, ella møguliga langtíðarleiga lendið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri vatn- og gøtuljósdeildini mæla til, at kommunan fer undir at kanna møguleikan og kostnaðin av at ogna sær neyðugt lendi til atkomuveg, øki til sjálva byrgingina og hóskandi øki runt um byrgingina.

**Tekniska nevnd 12. juni 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Talan er um u.l. 55.000 $m^2$ av lendi og sambært Búnaðarstovuni er prísurin kr. 27,00 pr $m^2$.

**Fíggjarnevndin 8. september 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið fyri læstum hurðum 11. september 2008**: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
**Støðutakan til ognartøku av lendi til vatnbyrging og reinsiverk í Kollafirði**
11. sept. 2008 samtykti býráðið, at kommuna fór undir at kanna møguleikan og kostnaðin av at ogna sær neyðugt lendi til vatnbyrging og atkomuveg v.m.

Fundir hava verið við Búnaðarstovuna um landsjørðina, og tykist hesin parturin av málinum at verða komin undir land.
Búnaðarstovan mælir kortini til, at kommunan fær avtalu í lag við ognarmørkina, áðrenn endalig avtala verður gjørd við Búnaðarstovuna.

Kommunan hevur í tveimum skrivum til ognarmørkina, 14. okt. 2009 og 4. juni 2010, sagt seg vera sinnaða at lata kr. 88,00 fyri fermeturin av haga í erva, sí kort 2001-2548/71, og kr. 110,00 fyri fermeturin av lendi í neðra runt verandi goymslubrunnar og lendi oman ímóti ánni, umframt atkomuvegi, sí kort 2008-1341/1.
Eisini verður latið kr. 0,70 pr. fermetur fyri mist bit í haga.

Í skrivi frá ognarmørkini, dagfest 31. mai 2010 og 1. juli 2010, verður ikki beinleiðis svara uppá kommununar tilboð, men sagt verður at jørð er til sølu um hóskandi prísur fæst fyri hana.

**Fíggjarlig viðurskifti:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ognarpartur í Todneshaga í erva | (15.198:5) x (88 + 0,7) | = | kr. 269.613 |
| Ognarpartur í Todneshaga í neðra | (8.000:5) x 110 | = | kr. 176.000 |
| Ogn hjá Kartin Joensen og Tummas Debes | (516+92) x 110 | = | kr. 66.880 |
| Í alt | | | kr. 512.493 |

Á konto L67001 "Vatnbyrging í Kollafirði" standa pr. 01.01.2011 kr. 3.040.000.

**Tilmæli:**
Vísandi til at samráðingar við umboðini fyri ognarmerkurnar higartil eru endaðar úrslitaleysar og at veitingin fyri brúksvatnið til borgarar í Kollafirði ikki er nøktandi, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á vatn- og gøtuljósdeildini til at ognartaka omanfyri nevndu partar av ognarpørtunum í Todneshaganum, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. januar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**22/11** **2008-1079**

**Føroya Arbeiðsgevarafelag: Heitir á Tórshavnar kommunu um at yvirtaka vegin inn til Vinnushúsið í Smærugøtu og at hann verður asfalteraður.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í skrivi, dagf. 10. apríl 2008, heitir Marita Rasmussen vegna Vinnúsið á kommununa um at yvirtaka og asfaltera vegin, ið er atkoma til vinnuhúsið.

Í skrivinum verður eisini upplýst, at Vinnuhúsið hevur selt grundøkir burtur av ognini og at hesi grundøki, sum liggja út ímóti Sundsvegnum, hava atkomu fram við Vinnuhúsinum og at onnur grundøkir og sethús eisini hava atkomu frá teirra vegi.

Í teldubrævi, dagf. 18 november 2009, (sí j. nr. 2009-308/1) vendir Marita Rasmussen sær aftur til kommununa við fyrispurningi um kommunan er áhuga í at yvirtaka vegin og soleiðis tryggja ognunum, ið liggja framvið vegnum, atkomu eftir vegnum og vísir til at eingin atkomurrættur til grannaognirnar, er tinglýstur á teirra matrikul nr. 1467a, Tórshavn.

Vegurin er 6 m breiður og líkur tí treytirnar í almennu byggisamtyktini Kap V §2 stk 1.e. har sagt verður " byggivaldið kann loyva, at hin avlagda breiddin verður sett niður í 6 m , um vegur bert gevur atgongd til í mesta lagi 4 grundir"

Víst verður eisini til undanfarnar samtyktir hjá teknisku nevnd og eftirfylgjandi býráðssamtykt frá 13. september 2007 (sí j. nr. 2000-2712/13), um almennar leiðreglur fyri yvirtøku av privatum vegum, har ásett er, at privatir vegir kunnu yvirtakast, um teir, umframt at lúka treytirnar í almennu byggisamtyktini, eisini við atliti til dygd, skulu lúka vanligar tekniskar treytir og í aðrar mátar ikki eru ein náttúrligur partur av einum privatum grundstykki.

Myndir frá 19. januar 2010 eru lagdar í málið, sí J. nr. 2008-1079/2.

Umframt at vegurin er atkoma til tær tvær ognirnar hjá Vinnuhúsinum, er vegurin eisini atkoma til tvey grundøkir, har av tað eina grundøkið er óbygt.

Sum er, lýkur vegurin ikki tekniskar treytir, sum kommunan vanliga setur til vegir, við tað at burturveitingin av yvirflatuvatni av vegnum ikki er nøktandi, vegurin hevur ikki nøktandi gøtuljós og vegjaðarin er ikki markaður ella girdur við kantsteinum.

Ivasamt er eisini um vegurin lýkur ásetingarnar í almennu byggisamtyktini, av tí at vegurin helst hevur munandi meiri ferðslu, enn roknast kann við, til tær í mesta lagi 4 grundir, sum verða nevndar í byggisamtyktini.

Eisini er vegurin náttúrligur partur av atkomuni til matr. nr. 1467a og 1467f, Tórshavn, ið sambært matrikulskránni eru ogn hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag o.fl.

**Tilmæli:**
Av tí at vegurin ikki hevur ta dygd sum krevst til ein tílíkan íbúðarveg, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini frá, at kommunan yvirtekur vegin í núverandi líki, men at søkjast kann av nýggjum um yvirtøku, tá vegurin lýkur ásett krøv.

**Tekniska nevnd 11. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Ì sambandi við viðgerðina av máli nr. 2009-2959, umsókn frá Selmar Nielsen, vegna Hjalta Hvítklett um útstykking á matr. nr. 1667d, Tórshavn, hevur umsitingin fingið upplýst, at hesin umsøkjarin er sinnaður at dagføra vegin fyri Vinnuhúsið, so at hann uppfyllir treytirnar. Greitt verður frá hvørji arbeiði skulu gerast, soleiðis at kommunan vil yvirtaka vegin.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at yvirtaka vegin, tá treytaðu arbeiðini eru gjørd, um eigarin framvegis ynskir hetta, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. januar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at gongubreyt skal gerast í ovara borð, áðrenn vegurin verður yvirtikin.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**23/11** **<u>2009-1547 - (sí eisini mál nr 2008-3152)</u>**

**<u>Parkeringsviðurskifti í miðbýnum</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í framhaldi av viðgerðini av málinum um bilfríðan miðbý á forfundi í býráðnum, sí j.nr. 2008-3152, verður í hesum málinum settur skjøtil á fyriliggjandi uppskot frá Rambøll um parkeringspolitikk tvs. parkeringsviðurskifti í miðbýnum

burturav. Fyri at kunna viðgera málið ítøkilga og eftirfylgjandi koma við tilmæli er neyðugt at kanna teknisku viðurskiftini, ið eru knýtt t.d. at eini gjaldsskipan, sum ætlan er at fara undir at gera.

Harumframt er umráðandi at kanna fíggjarligu viðurskiftini við eini slíkari skipan sum t.d. innan útvegan av skipanini og rakstur. Í verandi parkeringsskipan eru parkeringsansararnir undir dagligari leiðslu av ferðslumyndugleikanum. Tórshavnar kommuna stendur fyri fíggjarliga rakstrinum av skipanini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1. umsitingin letur gera uppskot til parkeringspolitik fyri kommununa
2. uppskot til skipan við tíðaravmarkingum og gjaldsparkering verður gjørt at leggja fyri nevndina aftur, við grundarlagið í "Parkeringsanalyse i Tórshavn Midtby" frá 1. apríl 2009 og "Parkeringspolitik for Tórshavn Midtby" frá 12. mai 2009
3. gjørd verður kostnaðarmeting av íløgum í samband við pkt. 2, og meting av inntøkum við slíkari skipan
4. játtaðar verða kr. 250.000 til kanningar- og fyrireikingararbeiði

**Tekniska nevnd 16. juni 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at mæla fíggjarnevndini til at játta pening til kanningararbeiðið.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2009:** Samtykt at játta kr. 250.000,- til kanningar- og fyrireikingararbeiðið av reguleringskontoini, at leggja fram í seinasta lagi 1. november 2009.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið kostnaðarmeting frá Rambøll & Nyvig uppá at gera uppskot til parkeringspolitikk. Umsitingin hevur gjørt viðmerkingar til uppleggið, og hevur havt fund við Rambøll & Nyvig um hetta hin 12. nov. 2009.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndin tekur undir við upplegginum til parkeringspolitik við teimum viðmerkingum umsitingin hevur gjørt, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina til góðkenningar.

**Tekniska nevnd 12. november 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við upplegginum til parkeringspolitikk frá Rambøll, dagfest 16/10-2009, við teimum viðmerkingum umsitingin hevur gjørt og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Rambøll & Nyvig hevur tillaga "Oplæg til P-politik", soleiðis at skrivligu viðmerkingarnar frá umsitingini og viðmerkingarnar á fundi við Rambøll & Nyvig hin 12. nov. 2009, nú eru innsettar í tekstin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur undir við tillagaða "Oplæg til P-politik", frá Rambøll & Nyvig, dagfest 16.11.2009, rev. 1, og at beina málið í býráðið til góðkenningar.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 26. november 2009**: Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Uppskot til parkeringsætlan var sent limunum í teknisku nevnd fyri jól 2010. Umsitingin leggur fram eina frágreiðing um hvussu farast skal fram í sambandi við kunning til borgaran. Framløgan er eitt framhald av framsendu parkeringsætlanini, og nevndin skal taka støðu til ymsar spurningar, so sum tímatakstir, útvegan av tólbúnaði og kostað v.m.

Í framhaldi av viðgerðini av málinum um bilfrían miðbý á forfundi í býráðnum, sí j.nr. 2008-3152, verður í hesum málinum settur skjøtil á fyriliggjandi uppskot frá Rambøll um parkeringspolitikk tvs. parkeringsviðurskifti í miðbýnum burturav. Fyri at kunna viðgera málið ítøkilga og eftirfylgjandi koma við tilmæli, er neyðugt at kanna teknisku viðurskiftini, ið eru knýtt t.d. at eini gjaldsskipan, sum ætlan er at fara undir at gera.

Harumframt er umráðandi at kanna fíggjarligu viðurskiftini við eini slíkari skipan sum t.d. innan útvegan av skipanini og rakstur. Í verandi parkeringsskipan eru parkeringsansararnir undir dagligari leiðslu av ferðslumyndugleikanum. Tórshavnar kommuna stendur fyri fíggjarliga rakstrinum av skipanini.

Umsitingin kunnar um frágreiðingina, herundir pkt. 1 – 18 (sí j. nr.: 2009-1547/25 og - /26) og pkt. 19 – 21.

**Tilmæli:**
Við grundarlagi í "*Forslag til P-politik for Midtbyen i Torshavn*" sum Rambøll hevur gjørt í januar 2011 (j. nr. 2009-1547/22), mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til, at umsitingin fær heimild til:

19. at taka upp samráðingar við Landsstýrið og aðrar myndugleikar um neyðugar heimildir í sambandi við at seta í verk parkeringspolitikkin, herundir heimild at seta í verk gjaldsparkering, at stovna parkeringsgrunn, og at skipa parkeringsskipanina sum sjálvstøðuga rakstrareind.

20. at taka upp samráðingar við eigarar av privatum parkeringsplássum innanfyri økið, sum parkeringspolitikkurin skal fevna um, um í hvønn mun og hvussu hesi pláss kunnu verða partur av parkeringsskipanini.

og

21. at nevndin góðkennir uppskotið hjá umsitingini til tíðarætlan fyri góðkenning, fyrireiking og íverksetan av parkeringsskipanini.

**Tekniska nevnd 13. januar 2011:**. Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Jákup Símun Simonsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur bert undir við pkt 19.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Nevndin heitir harumframt á teknisku nevnd um beinanvegin at gera uppskot um tíðaravmarkaða parkering í miðbýnum.

**Býráðið 27. januar 2011:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Sjúrður Olsen, Jan Christiansen og Vagnur Johannesen, um at taka upp samráðingar við Landsstýrið og aðrar myndugleikar um neyðugar heimildir í sambandi við at seta í verk parkeringspolitikkin, herundir heimild at seta í verk gjaldsparkering, at stovna parkeringsgrunn, og at skipa parkeringsskipanina sum sjálvstøðuga rakstrareind. Eisini verður mælt til at seta tíðaravmarkaða parkering á Skálatrøð og á “grøna parkeringsplássinum”, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Sjúrður Olsen, Jan Christiansen og Vagnur Johannesen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Rúni Djurhuus.

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein

Síðan varð atkvøtt um tilmælið í fíggjarnevndini, ið var samtykti við 11 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Sjúrður Olsen, Vagnur Johannesen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddi: Annfinn Brekkstein

**24/11** **<u>2010-2731</u>**

**<u>Ásetan av fundardøgum býráðsins fyri 2011</u>**

Uppskot frá umsitingini til fundardagar:

| | | |
|---|---|---|
| 27. januar | 08. september | |
| 24. februar | 29. september | fíggjarætlan |
| 24. mars | 20. oktober | |
| 14. apríl | 27. oktober | fíggjarætlan |
| 18. mai | 24. november | |
| 26. mai | 14. desember | |
| 16. juni | | |

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Býráðsfundurin 26. mai verður avlýstur, tí fundurin 18. mai varð ætlaður fyri henda fundin.

**Býráðið 27. januar 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

# Mál uttan fyri skrá:

**25/11** **2006-3283**

**Brúgvin um Sandá**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til málsgongd í málinum j. nr. 2001-0695, við býráðssamtykt av 22. mai 2003, hevur umsitingin umrøtt málið og er av tí fatan, at umráðandi er at kanna aðrar møguleikar fyri tilgongd til málið.

Umsitingin mælir tískil til at leita ráðgeving hjá serfrøðingum innan brúgvabygging við tí fyri eyga at fáa til vega hóskandi byggilistarligt snið, teknisk og fíggjarliga forsvarlig brúgvagerð, sum samstundis líkar krøvini hjá friðingarmyndugleikunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða 500.000 kr at gera arbeiðs- og byggiskrá við tilhoyrandi skitsuuppskoti til støðutakan, vísandi til mannagongd fyri verkætlanum hjá Tórshavnar kommunu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 500.000 av íløgum.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Val av býráðslimum til bygginevnd fyri Brúnna um Sandá sambært § 36 í kommunustýrislógini

**Býráðið 27. september 2007:** Valdir vóru Jógvan Arge og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Umval av býráðslimum í bygginevndina Brúgv um Sandá sambært § 36 í kommunulógini.

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Sambært yvirliti yvir arbeiði fíggjað av íløgum fyri 2009 (skjal nr. 2009-2360/1), eru markaðar kr. 1.000.000,- til fyrireikingararbeiði viðv. Brúnni um Sandá, sum partur av langtíðaríløguætlan kommununar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta avsettu upphæddina á kr. 1.000.000,- til framhaldandi projektering og fyrireikingar, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 3. desember 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundum viðgjørt spurningar til framhaldandi projektering av brúnni og í sambandi við fyrireikingarnar fer nevndin m.a. at mæla til, at arbeiðið hjá nevndini eisini skal fevna um vegastrekkini báðumegin sjálva brúnna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við tilmælinum í fundarfrásøgn nr. 7 (j. nr. 2006-3283/23) og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 29. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. mai 2010:** Borgarstjórin var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

Tekniski stjóri greiddi frá málinum.

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum í fundarfrásøgn nr. 7 (j. nr. 2006-3283/23) soleiðis, at arbeiðið hjá bygginevndini eisini kemur at fevna um vegastrekkini báðumegin brúnna um Sandá.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av tilgongdini av projektering av brúnni, hevur bygginevndin á fundi 4. november 2010 viðgjørt spurningin um innihaldið í einum byggiprogrammi og hvør skal bjóða uppá hetta arbeiðið. Byggiprogrammið skal fevna um:
1. Stutt frágreiðing um byggimálið
2. Almenna endamálsorðing
3. Myndugleikagóðkenningar og galdandi reglugerðir
4. Stødd á brúgv ella frágreiðing um faktisk teknisk viðurskifti.
5. Tann bjóðandi skal definera kriteriið fyri design av brúnni.

6. Hædd skal verða tikin fyri samlaðari last á brúgv – herundir neyðugu lastkombinatiónir innan galdandi normum.
7. Hædd skal verða tikin fyri geotekniskum kanningum á staðnum.
8. Frágreiðing um bygging, logistik o.a. í hesum sambandi
9. Tekniskar veitingar
10. Evt. onnur útgerð
11. Tíðarætlan og kostnaðarmeting av brúnni
12. Kostnaður/tilboð fyri byggiprogrammið
13. Tíðarfreistin at gera byggiskránna er 6 vikur.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at:
1. Taka undir við uppskotinum um byggiprogram sambært fundarfrásøgn nr. 8 skjal nr. 2006-3283/29.
2. Biðja p/f LBF og EFLA h/f um at koma við tilboði upp á byggiprogram.
3. Beina málið, um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina, í býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 2. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.
Levi Mørk var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Málið umrøtt. Verður tikið upp aftur á einum seinni fundi.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi hin 18. januar 2011 viðgjørt málið av nýggjum, og mælir til fylgjandi at leggja fyri teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráð.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til:
1. At umsitingin við neyðugari hjálp frá ráðgevum, ger uppskot til byggiskrá at leggja fyri bygginevndina, faknevdir og býráð innanfyri 6 vikur.
2. At byggiskráin tekur útgangsstøði í samtyktini í bygginevndini hin 4. november 2010
3. At talan skal verða um betongbrúgv
4. At arbeiðið verður boðið út í innbodnari heildararbeiðstøku millum upp til 5 heildararbeiðstakarar eftir uppskoti frá umsitingini
5. At hvør tilboðsgevari kann lata inn upp til 2 uppskot
6. At umsitingin ger uppskot til dømingarkriteriir og dómsnevnd at leggja fyri bygginevndina, faknevdir og býráð innanfyri 6 vikur.
7. At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. 2,0 mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tekniska nevndin 20. januar 2011:** Ein meirluti, Marin Katrina Frýdal, Sjúrður Olsen, Halla Samuelsen og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini og at beina málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.
Ein minniluti, Jákup Símun Simonsen, tekur undir við tilmælinum við teirri broyting, at pkt 4: *'at arbeiðið verður boðið út í innbodnari heildararbeiðstøku millum føroysk virki'.*

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. januar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini.

**Ískoyti:**
Vísandi til pkt. 7 í tilmælinum til fíggjarnevndina hin 19. januar 2011, er av misgávum komið skeivt tal at standa um játtanina á kr. 2,0 mió. av íløgum fyri 2011. Rættað talið er kr. 2,6 mió., sambært íløguætlan kommununar fyri 2011. Tískil verður mælt til at broyta hetta sambært niðanfyristandandi tilmæli

**Tilmæli:**
Vísandi til íløguætlan kommununar fyri 2011, mæla miðfyrisitingarstjórin og tekniski stjórin fíggjarnevndini og býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd 20. januar 2011 og byggi- og býarskipanarnevndini 26. januar 2011, við hesi broyting av pkt. 7:

7. At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. **2,6** mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Fíggjarnevndin 27. januar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini við hesi broyting av pkt. 7: At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. **2,6** mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**26/11** **<u>2010-2767</u>**

**<u>Val av býráðslimum til stýrisbólk til umskriving av heildarætlan til kommunuplanin sambært § 36 í kommunustýrislógini</u>**

**Býráðið 27. januar 2011:** Vald vóru Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal, Bogi Andreasen, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

## FUNDUR LOKIN KL. 20:00

## GERÐABÓKIN GÓÐKEND:

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Rúni Djurhuus | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |